# Jólakalendarin 2006

## Trumm trumm tralla la!





Trøllapætur gleddi seg til í morgin. Hann skuldi syngja fyri børnunum á Trøllakambi, sum var tann elsti barnagarðurin har um leiðir. Og nú royndi hann at læra seg sangirnar uttanat. Hann gekk runt í trøllasmáttini og trallaði og trummaði sama ørindi umaftur og umaftur.

*Trumm trumm tralla la*
*Á jólum tá fara øll trøll*
*at ganga um dalar og fjøll*
*At trampa og vampa*
*um bygdir og bý*
*á jólatíð*

Oftani ynskti Trøllapætur, at hann hevði sama góða musikkoyra sum omman. Henni nýttist hvørki at venja gittar ella trummur. Ei heldur klaver ella harmoniku. Omman dugdi kortini at spæla uppá øll ljóðføri. Hvussu hon ber seg at skilti ongin. Ei heldur trøllaomman sjálv. Hon hevði bara hesar trøllagávur og tær hevði hon neyvan fingið frá jólamanninum.

Trøllapætur royndi at sláa í eina gamla trummu, sum hann einaferð hevði fingið í føðingardag frá einum trummutrølli, ímeðan hann taldi 1, 2, 3 og 4.

TRUMM TRUMM TRALLA LA!

Trøllapætur hevði nærum gloymt alt um jólakalendaran, tá ið omman helt fyri, at nú kundi hon gott hugsað sær at vita hvør dagur tað var.

Trøllapætur slepti trummuni og leyp spentur yvir til ommuna, sum stóð og grunaði yvir hvør lúka, ið nú stóð fyri tørni.

– Nú er tað nummar trettan, omma!

Trøllapætur fekk fingurin inn undir lúkuna og boygdi pappinum soleiðis, at tey bæði kundu síggja myndina.

– Hygg, ein gittar, omma. Ein rock and roll gittar. Næstan líkasum tú plagar at spæla uppá omma. Tað var løgið?!

- Á, píkarill Trøllapætur. Ein spildurnýggj og fín gittar. Ja, handan kann ivaleyst spæla nógvar sangir. Tað dugir omma at síggja og hoyra beinanvegin.

Trøllapætur hugdi enn einaferð at myndini og so uppá trøllaommuna.

– Kann eg fáa eina gittar í jólagávu. So kann eg læra meg at spæla onkran trøllasang og barnasang.

– Á, góðasti Trøllapætur, besti hjá ommuni. Tú ynskir tær næstan alt í verðini. Og ALT kostar nógvar pengar. Og trøllaommur arbeiða ikki úti á jólum, tað gera bara jólamenn.

Trøllaomman streyk Trøllapæturi oman eftir teimum mongu kinnunum, og mussaði øll níggju høvdini góða nátt.

– Jú, nú fáa vit at síggja. Hvør veit, kanska jólamaðurin hevur eina gittar í posanum. Men vit mugu bíða til jólaftan at vita hvørjar gávur vit fáa.








Barnavanlukkutrygging

Hevur tú tryggjað børnini?

Tel 345600, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

- so ert tú tryggari